

## Sat einsamallur í 74 døgn

Ein grønlendskur fangi sat frá 23. mai til 3. august í 2007 einsamallur í einum rúmi. Sambært notatum í fongslinum í Sisimiut, slapp maðurin bert út triðja hvønn dag, at fáa fríska luft í eitt lítið bil. - At sita fangi á henda hátt er beinleiðis ímóti galdandi lógunum og er serstakliga vánaligt, sigur Ríkisumboðsmaðurin í Grønlandi. Ríkisumboðmaðurin hevur fleiri reisur rykt eftir svarið í málinum. Svarið kom í august. Næstan eitt ár eftir, at maðurin er leyslatin. Løgmálaráðið metir málið vera sera óheppið, sum tað verður nevnt í svarinum.

# Høgni peikar á fullveldi

**Høgni Hoydal peikaði ikki á nakran ávísan persón sum samráðingarleiðara, men vísti á, at løgtingið hevði søguliga stóran meiriluta av fullveldisflokkum**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Formansrunda byrjaði hjá løgtingsformanninumklokkan hálvgum tíggju í morgun. Fyrstur – umboðandi størsta flokkin á tingi – inn til løgtingsformannin var Høgni Hoydal. Hann greiddi løgtingsformanninum frá, at stýrisskipanin virkaði ikki á nøktandi hátt, tí løgmaður hevði alt ov stórt vald.

- Við verandi skipan kann løgmaður í prinsippinum sita líka til hann fær eitt misálit ímóti sær. Tað merkir, at hann sum løgmaður automatiskt fær initiativið eftir eitt val, og tí standa fólk spyrjandi, hví størsti flokkur ongantíð sleppur framat, sigur Høgni Hoydal.

Hann vísti annars á, at samansetingin í tinginum vísir ein søguliga stóran meiriluta av fullveldis tinglimum, og hann mælti tí til, at skipað varð ein fullveldis samgonga.

- Fólkið hevur talað og valt fullveldisvongin sterkari og sterkari inn á ting. Í dag er tann vongurin søguliga sterkur, umboðandi 20 av 33 tinglimum, sigur Høgni Hoydal.

Líka til tað síðsta royndi formaðurin í Tjóðveldi at ávirka støðuna og vísti Jørgen Niclasen á stóra meirilutan fyri einari fullveldissamgongu. Og hóast løgtingsformaðurin ikki í slíkum føri burdi verið politiskur, so kundu onkrar viðmerkingar tulkast tann vegin, at hann hevði róð fram undir aðra loysn enn Kaj Leo Johannesen sum samráðingarleiðara.



*Líka fram til formansrunduna í morgun royndi formaður Tjóðveldis at ávirka Jørgen Niclasen og Fólkaflokkin at venda ABC bakið og heldur skipa eina fullveldissamgongu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Samgonguskjalið kunngerðast

Sambandsflokkurin er enn hin einasti, sum hevur boðað frá sínum landsstýrisevnum. Og sum Sosialurin vísti á, gjørdist Jóhan Dahl vinnumálaráðharri og Rósa Samuelsenalmannamálaráðharri.

Tað gekk ótrúliga skjótt. Vit høvdu als ikki umrøtt spurningin undan floksfundinum í gjár, men kortini nýttu vit bert 15-20 minuttir, til vit høvdu tikið støðu, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hinir báðir flokkarnir fóru at umrøða síni landsstýrisevni eftir formenninir høvdu verið inni hjá løgtingsformanninum í formansrunduni.

Tað er nógv sum bendir á, at meðan Sosialurin fekk rætt tá gitt var um sambandsráðharrarnar og allarhelst fær rætt hvar Fólkaflokkinum viðvíkur, so verða landsstýrisfólkini ikki tey, sum nevnd vórðu í blaðnum í gjár. Tað er nevniliga nógv sum bendir á, at tað verða John Johannesen, Helena Dam á Neystabø og Eyðgunn Samuelsen, sum fara at umboða Javnaðarflokkin í landsstýrinum.

Og sum skilst á lagnum er John Johannesen eitt gott boð upp á nýggjan fíggjarmálaráðharra, meðan Helena Dam á Neystabø verður mentamálaráðharri og Eyðgunn Samuelsen fær so heilsumál.

Annars boðar Kaj Leo Johannesen inn til tíðindafund klokkan 17 í dag, har samgonguskjalið verður almannakunngjørt.

# John møtti til formansrundu

**Tað skapti ikki sørt av undran og elvdi eisini til gitingar, tá John Johannesen møtti til formansrunduna í løgtinginum í morgun**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Leysasøgur hava gingið síðani nýggj samgonga varð skipað og Jóannes Eidesgaard ikki verður løgmaður um, at eitt formansskifti stóð fyri durum í Javnaðarflokkinum.



*Tað var einki odiøst í, at John Johannesen møtti til formansrunduna í morgun. Orsøkin var ein feilur á løgtingsskrivstovuni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Og tað var eldur á bálið, tá John Joannesen í morgun møtti til formansrunduna í løgtinginum og ikki Jóannes Eidesgaard.

Men hetta komst ikki av, at John Johannesen er vorðin nýggjur floksformaður í Javnaðarflokkinum, men heldur av einum feili á løgmansskrivstovuni.

- Hatta var ein feilur frá okkara síðu, og tá vit ringdu fyri at rætta hann, var tað longu ov seint, sigur Súsanna Danielsen, stjóri á løgtingsskrivstovuni.

Feilurin kom í av orðingini í stýrisskipanarlógini har tað stendur, at til formansrunduna møtir formaður flokkana á tingi, sum síðani eina løtu varð tulkað sum formaður Javnaðarfloksins á tingi, sum altso er John Johannesen.

Tað ljóðar eisini, at Javnaðarflokkurin á leiðslufundi í gjárkvøldið manaði allar gitingar um eitt formansskifti í jørðina.